Rodmundur Nielsen:

# Heldur fram sum borgarstjóri

**Nývalda býráðið í Runavíkar kommunu hevur á fundi í Elduvík gjørt av at skipa seg við Rodmundi Nielsen sum borgarstjóra og Kára P. Højgaard sum varaborgarstjóra. Í gjárkvøldið varð býráðið so endaliga skipað á almennum býráðsfundi**

SKIPAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Samstundis, sum semja er fingin í lag um borgarstjórasessin og varaborgarstjórasessin, er eisini gjørt av, hvussu nevndarsessir og nevndarumboðan skulu skipast.

Nevndirnar hjá Runavíkar býráði verða skipaðar soleiðis:

**Fíggjarnevndin:** Rodmundur Nielsen, formaður, Regin Jacobsen, næstformaður og Asbjørn Mikkelsen. Eykalimir verða Ólavur A. Olsen og Klæmint Østerø.

**Tekniska nevnd:** Regin Olsen, formaður, Kári Johannesen, næstformaður og Ólavur A. Olsen. Eykalimir verða Hans Jacob Lamhauge og Klæmint Østerø.

**Havnanevndin:** Klæmint Østerø, formaður, Kári P. Højgaard, næstformaður og Kristian Gaardbo. Eykalimir verða Hans Petur Ellingsgaard og Regin Jacobsen.

**Sosiala nevnd:** Kristian Gaardbo, formaður, Hans Jacob Lamhauge, næstformaður og Ólavur A. Olsen. Eykalimir verða Klæmint Østerø og Hans Petur Ellingsgaard.

**Mentunarnevndin:** Hans Petur Ellingsgaard, formaður, Regin Jacobsen, næstformaður og Asbjørn Mikkelsen. Eykalimir verða Regin Olsen og Ólavur A. Olsen.

**Byggi-og býarskipanarnevndin:** Hans Jacob Lamhauge, formaður, Kári Johannesen, næstformaður og Hans Petur Ellingsgaard. Eykalimir verða Kári P. Højgaard og Ólavur A. Olsen.

Sum umboð hjá kommununi í ymiskum nevndum verða hesi:

**SEV:** Ólavur A. Olsen, Regin Olsen, Hans Jacob Lamhauge og Hans Tausen Olsen. Eykalimir: Kristian Gaardbo, Asbjørn Mikkelsen, Kári P. Højgaard og Klæmint Østerø.

**IRF:** Regin Jacobsen. Eykalimur: Hans Petur Ellingsgaard.

**Kongshavnar Havn:** Klæmint Østerø og Kári Johannesen. Eykalimur: Regin Olsen.

**Eysturoyar Røktar-og Ellisheim:** Asbjørn Mikkelsen, Hans Jacob Lamhauge, Kári P. Højgaard og Sæunn Ó. Hansen. Eykalimur: Regin Jacobsen.

**Skálafjarðar sløkkilið:** Kristian Gaardbo og Ólavur Asafsson Olsen. Eykalimur: Asbjørn Mikkelsen.

**Bygdasavnið Forni:** Hans Jacob Lamhauge. Eykalimur: Ólavur A. Olsen.

**Felagið Høganes:** Hans Petur Ellingsgaard. Eykalimur: Kristian Gaardbo.

**Ferðavinnan í Eysturoy:** Rodmundur Nielsen. Eykalimur: Klæmint Østerø.

**Musikkskúlanevndin:** Hans Petur Ellingsgaard, Kristian Gaardbo og Asbjørn Mikkelsen. Eykalimur: Hans Jacob Lamhauge.



*Borgarstjórin í Runavíkar kommunu seinastu fýra árini, Rodmundur Nielsen, heldur fram – nú í eini uppaftur størri kommunu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Kári P. Højgaard er varaborgarstjóri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Sonni flestar atkvøður í Sjóvar kommunu

**Listi A fekk fýra umboð vald og listi C trý. Listi B, sum bert fekk 6,2% av atkvøðunum, fekk einki umboð í nýggja bygdaráðið**

KOMMUNUVALIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Til komunuvalið í Sjóvar kommunu vóru tríggir listar, A, B og C.

Listi A fekk 339 atkvøður og fýra umboð vald. Hesi vóru: Sonni Johannesen (68), Malena Thomsen (64), Kaj Otto fredriksberg (64) og Hans Petur Jacobsen (53). Listi A fekk 57,2 % av atkvøðunum.

Listi B fekk bert 6,2 % av atkvøðunum og einki umboð í bygaráðið.

Listi C fekk 217 atkvøður sum svara til 36,6 % av atkvøðunum. Trý umboð vórðu vald á lista C: Meinhard Jacobsen (40), Pole Johannes Hansen (35) og Eli Høj Joensen (34).

Við seinasta kommunuval í Sjóvar kommunu fekk Eivind Jacobsen, sum hevur verið borgarstjóri seinastu árini, 108 atkvøður.

# Tordur J. Niclasen fremstur í Eiðis kommunu

KOMMUNUVALIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ikki færri enn fimm listar bjóðaðu seg fram til valið í Eiðis kommunu hesaferð. Av hesum fingu fýra listar umboðan í bygdaráðnum. Listi D stóð seg best við 151 atkvøðum og trimum umboðum, sum eru: Tordur J. Niclasen (69), Rólant Poulsen (31) og Anna Maria Poulsen (17).

Listi E fekk næstflestar atkvøður, nevniliga 133, sum gav tvey umboð í bygdaráðið: Jóhan K. Joensen (35) og Anfinn Kruse (29).

Listi A, sum fekk 71 atkvøður og listi C, sum fekk 60 atkvøður, fingu hvør sítt umboð: Tey eru ávikavist: Tom Joensen (A, 19) og Jógvan Kallsoy Mørkøre (C, 32).

Nevnast kann, at Tordur J. Niclasen, sum hevur verið borgarstjóri í Eiðis kommunu seinastu árini, á kommunuvalinum undan hesum fekk 53 atkvøður móti teimum 69, sum hann fekk á valinum hesaferð.



*Á valinum hesaferð fekk Tordur J. Niclasen, borgarstjóri, 69 atkvøður móti 53 á valinum undan hesum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Høgni Mikkelsen er í skeivum flokki

**Heðin Mortensen langar bæði út eftir fyrrverandi floksfelagnum, Høgna Mikkelsen, og formanninum í Sambandsflokkinum. – Tað er einki nýtt, at Høgni og Jan Christiansen hava eitt tætt samstarv. Áðrenn vit yvirhøvur vóru komnir til samgonguborðið mikunáttina hevði Høgni gjørt eina undirhondsavtalu við Fólkaflokkin, sigur hann**

KRÍGGJ Í SAMBANDSFLOKKINUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Innanhýsis stríðið millum tveir tjóðveldistingmenn hevur ikki meir enn lagt seg, so kyknar eitt nýtt innanhýsis floksstríð í øðrum flokki. Nýggi borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, hevur fingið knívin á barkan frá Sambandsflokkinum, og hann hevur fingið valið at verða skotin ella hongdur.



*– Tað er einki nýtt, at Høgni og Jan Christiansen hava eitt tætt samstarv. Áðrenn vit yvirhøvur vóru komnir til samgonguborðið mikunáttina hevði Høgni gjørt eina undirhondsavtalu við Fólkaflokkin. Hetta varð eg greiður yvir alt fyri eitt, tí øll okkara ynski vórðu feia av borðinum, tí tað sigur seg sjálvt, at Fólkaflokkurin kveistrar alt til viks, tá teir frammanundan høvdu fingið avtaluna undir land. Høgni gjørdi júst tað sama fyri fýra árum síðan, greiðir Heðin Mortensen frá*

Heðin Mortensen hevur ikki tikið støðu, um hann sjálvur fer úr Sambandsflokkinum ella um hann skal berast út.

Atkvøðuslúkurin hjá Sambandsflokkinum við 667 persónligum atkvøðum á býráðsvalinum í Havn langar nú bæði út eftir formanninum í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen og Høgna Mikkelsen fyri teirra leiklut í stríðnum, sum hevur tikið seg upp í Sambandsflokkinum.

### Fólkafloksmaður

Heðin Mortensen leggur Høgna Mikkelsen undir at renna ørindi fyri Fólkaflokkin, heldur enn at arbeiða fyri Sambands-

*Framhald á síðu 22*

## Burtur úr vón og viti

**Formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, vísir staðiliga aftur, at hann kendi til samgonguavtaluna, sum Heðin Mortensen av sínum eintingum gjørdi við Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin**

STRÍÐ Í SAMBANDSFLOKKINUM
*Páll Holm Johannesen*

Í Degi og viku mikukvøldið vísti nýggi borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, á, at formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, kendi væl til avtaluna, sum hann einsamallur gjørdi við Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin.

Heðin Mortensen segði millum annað, at hann hevði ráðført seg við formannin í Sambandsflokkinum gjøgnum samráðingarnar við Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin, og tí skilti hann als ikki, at Kaj Leo Johannesen nú var altráður at fáa hann úr Sambandsflokkinum. Hesum ákærum vísir Kaj Leo Johannesen staðiliga aftur.

– Eg kendi væl til avtaluna millum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, men sjálvsagt kendi eg ikki til seinnu avtaluna. Tað er beinleiðis tápuligt av mær sum floksformanni at stuðla einum av býráðslimunum, sum ikki boðar hinum flokslimunum til fundin, og sum sjálvur gera eina avtalu við aðrar flokkar, tá vit upprunaliga hava eina avtalu, sigur hann.

*Lýgur Heðin Mortensen?*

Tú fært ikki meg til at siga, at nakar lýgur, men tað hann sigur er burtur úr vón og viti, svarar Kaj Leo Johannesen.

# Heðin Mortensen útkoyrdur

**Annfinn Brekkstein, formaður í Føroya Væl, sigur, at tað, sum Heðin Mortensen hevur gjørt eigur at fáa fylgjur beinanvegin, og tað hevur tað eisini fingið. Heðin Mortensen er ikki longur limur í Suðurstreymoyar Sambandsfelagi**

VALIÐ 04
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Tað kemur ikki upp á tal hjá Sambandsflokkinum at bróta eina skrivliga avtalu, sum er gjørd. Tað elvir til stórt misálit á flokkin, og tey fólkini, sum umboða hann. Heðin Mortensen fór út einsamallur, uttanum flokkin, og tað má standa fyri hansara egnu rokning, sigur Annfinn Brekkstein, formaður í Føroya Væl.

Heðin Mortensen er í skrivi biðin um sjálvur at taka seg úr Føroya Væl beinanvegin. Ger hann ikki tað, verður limaskapur hansara uppsagdur.

Spurdur um, hvat beinanvegin í hesum førinum merkir, svarar Annfinn Brekkstein, at beinanvegin merkir beinanvegin.

– Eg haldi, at tað kemur ógvuliga greitt fram í hasum skrivinum, at Heðin Mortensen ikki longur er limur í Føroya Væl, óansæð um hann sjálvur tekur seg úr ella ikki, staðfestir Annfinn Brekksein.

### Missa atkvøður

– Heðin Mortensen skrivaði undir eina skrivliga avtalu við Fólkaflokkin. Alt tað, sum hann síðani gjørdi, hevur hann gjørt fyri egna rokning. Sambandsflokkurin fer ongantíð at bróta eina skrivliga avtalu. Tað skal ikki koma fyri, sigur ein ógvuliga avgjørdur formaður í Føroya Væl.

Spurdur um Sambandsflokkurin ikki bítur seg sjálvan í halan við at koyra Heðin Mortensen út, eftirsum hann jú plagar at vera tann stóri atkvøðuslúkurin hjá Sambandsflokkinum, svarar Annfinn Brekkstein, at teir ikki ræðast at halda avtalur. Óansæð avleiðingarnar.

– Heðin Mortensen hevur brotið eina skrivliga avtalu, sum hann hevði gjørt fyri Sambandsflokkin. Tað má fáa avleiðingar, og tað fær tað nú. Heðin Mortensen er ikki longur limur í Føroya Væl. Tí Sambandsflokkurin er ikki bangin fyri at missa atkvøður av at standa við avtalurnar, sum vit gera, sigur Annfinn.

Annfinn sigur, at tað var ein púra samd nevnd, ið tók avgerðina, um at eksludera Heðin Mortensen.

– Vit vóru øll púra samd, og Heðin hevur eisini fingið boðini. Enn veit eg ikki um hann hevur tikið seg úr Føroya Væl, tí eg havi enn ikki verið heima aftur, síðani skrivið varð sent. Men limaskapurin verður undir øllum umstøðum strikaður, staðfestir Annfinn.

# C stendur við samgonguavtaluna

**Býráðslimurin hjá Javnaðarflokkinum, Elin Lindenskov, sigur, at Javnaðarflokkurin hevur ongar ætlanir um leypa frá samgonguavtaluni við Tjóðveldisflokkin og Heðin Mortensen.**

SAMGONGUTELVING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Seinasta døgnið hevur verið tutlað í krókunum um, at Javnaðarflokkurin møguliga fer at leypa frá avtaluni, sum flokkurin mikudagin undirskrivaði við Tjóðveldisflokkin og Heðin Mortensen fyri komandi valskeið í Tórshavnar býráð.

Eftir avtaluna millum nýggju samgonguna í Tórshavnar býráð hevur samband verið millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin. Tað vátta bæði Elin Lindenskov og Jan Christiansen. Kortini avsannar Elin Lindenskov, at Javnaðarflokkurin umhugsar at leypa frá avtaluni við Tjóðveldisflokkin og Heðin Mortensen.

– Nú havi eg ikki tosað við Katrin (D. Jakobsen, blðm), men persónliga standi eg við avtaluna, sum varð gjørd í gjár, sigur hon.

*Hví hava tit havt samband við Fólkaflokkin eftir at ein samgonguavtala er gjørd?*

Tað veit eg ikki. Fólkaflokkurin hevur sett seg í samband við okkum, og vit hava bert lurta eftir, hvat teir hava at siga.

*Hava tit fingið bjóðað borgarstjórasessin?*

Nei, tað kenni eg einki til.

Klokkan 19 í kvøld skuldu nýggja býráðssamgongan hittast aftur at umrøða nærri, hvussu býráðsarbeiðið skal skipast komandi árini. Elin Lindenskov og Katrin Dahl Jakobsen skuldu saman við Suðurstreymoyar Javnaðarfelag fundast seinnapartin hósdagin.